

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 01 - 2013

# Statoil eydnuna við sær í Eysturafrika

Norska oljufelagið Statoil, sum stendur fyri flestu av leitiloyvunum á føroyska landgrunninum, hevur havt rættiligan vind í seglunum í leitingini kring heimin. Eitt av seinastu økjunum, har Statoil hevur fingið nógv burur úr sínum leitiíløgum, er í Eysturafrika, har felagið hevur rakt við gass í fleiri boringum. Herfyri kunngjørdi felagið, at avmarkinarbrunnur í einum av loyvunum út fyri Tanzania hava rakt við enn eitt gassfund. Statoil arbeiðir saman við ExxonMobil í Eysturafrika eins og tað ger tað í Føroyum. Væleydnaðu brunnarnir út fyri Tanzania eru so mikið lovandi, at Statoil er farið til arbeiðsborðið við tí fyri eygað at menna ein nýggjan gasslandslut í hesum partinum av heiminum. Í løtuni verður seismikkur skotin umframt, at tað verður borað. Talan er um djúpvatnsbrunnar á 2580 metra dýpi. Borað er niður á 5270 metrar. Statoil sigur í einum tíðindaskrivi, at fundini í Eysturafrika hava stóran týdning fyri altjóða strategiina hjá felagnum, sum fevnir um øki í Kanada, Alaska, Grønlandi, Barentshavinum, Brasilia og Afrika. Aftrat hesum kemur virksemi hjá felagnum í Norðsjónum.